## Ísland og Kroatia ísenn

Ísland og Kroatia kunnu fáa liaskap í ES sama dag, men tað krevur, at tann íslendska stjórnin má kvika sær við fyrireikingunum. Tað sigur kommiserurin Olli Rehn, sum hevur við umsóknir frá øðrum londum at gera. Tað er møguligt, at ES-nevndin fer at gera sína meting av Íslandi sum umsøkjara seinni í ár, og tann metingin verður so latin ríkis- og stjórnarleiðarunum at taka støðu eftir. Svøríki hevur í løtuni formansskapin í ES, og svenskar keldur hava sagt, at tað er ov tíðliga at siga, um íslendska umsóknin kemur fyri á toppfundinum í desember.



## Ósemja um avgjald

Tann 11. november fara umboð fyri Atlantic Airways og Air Greenland at gera eina roynd at loysa ósemjuna um avgjaldshækkingina, sum floghavnin í Kastrup ætlar at seta í gildi. Leiðslan í Kastrup kunngjørdi fyrr í ár, at í framtíðini skulu føroysk og grønlendsk flogfeløg rinda sama avgjald sum útlendsk flogfeløg, tá teirra flogfør eru í Kastrup. Tað fer at hava við sær, at avgjaldið hækkar 90 krónur fyri hvørt ferðafólkið, sum feløgini so leggja oman á ferðaseðlaprísin. Hækkingin skuldi koma í gildi 1. oktober.



# Klaksvík mælir til javning

**Á fundi í gjár, staðfesti fíggjarnevndin hjá Klaksvíkar kommunu, at hon tekur fult undir við javningarskipan millum kommunurnar**

KOMMUNU-REFORMUR

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Ein samd fíggjarnevnd í Klaksvík tekur staðiliga undir við útjavning millum kommunur, um kommunu-reformurin verður veruleiki.

Tað upplýsir heimasíðan hjá Klaksvíkar kommunu.

Somuleiðis mælir fíggjarnevndin til, at tað er neyðugt at tryggja, at uppgávurnar, sum ætlanin er at flyta frá landi til kommunu - veruliga verða fluttar - áðrenn ætlaðu kommunusamanleggingarnar verða gjørdar.

Í samband við uppgávurnar hjá kommununum, metir fíggjarnevndin í Klaksvík, at skilabesta loysnin er at hækka kommunuskattin og minka um landsskattin, heldur enn at gera ein sokallaða blokkskipan, har kommunurnar fáa pening frá landinum til at fíggja nýggju uppgávurnar.

– Vit hava sera ringar royndir av teimum skipanum, har landið letur eina játtan til kommunurnar at umsita, tí fleiri dømi eru um, at hesar brádliga verða skerdar ella heilt tiknar burtur, tá ið landið sjálvt hevur fíggjarligar trupulleikar, sigur Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík, við heimasíðuna hjá kommununi.

Afturat hesum sigur fíggjarnevndin hjá Klaksvíkar kommunu, at tað er umráðandi, at útoyggjarnar ikki missa rættindi.

## Lesandi mótmæla skerjingar í stuðli

Meginfelag føroyska studenta og næmingar á seks ymiskum útbúgvingum mótmæla harðliga, at ætlanin er at skerja stuðulin hjá føroyskum lesandi

Bæði lesandi í Føroyum og lesandi uttanfyri Norðurlond fara at merkja skerjingar, nú Mentmálaráðið hevur gjørt uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul.

Fýra mótmæli eru í skrivinum, sum tey lesandi hava sent.

Tey mótmæla, at ÚSUN – Tað er útbúgvingarstuðul uttan fyri Norðurlond – verður skerdur við 40.000 krónum árliga, úr 120.000 krónum niður í 80.000 krónur.

Tey mótmæla, at tey lesandi, sum longu fáa ÚSUN missa stuðulin - um uppskotið verður samtykt - so peningaliga grundarlagið verður munandi skert í komandi ári, hóast tey eru farin undir útbúgvingina.

Tey mótmæla, at fleiri helst ikki fara at taka masterútbúgvingar. Tí annar stuðul dettur burtur eftir fýra árum, og tá er tørvur á meira enn 80.000 krónum til at rinda fyri útbúgvingina.

Og harumframt mótmæla tey, at aftur komandi ár, verður vanligi útbúgvingarstuðulin ikki prístalsreguleraður, sum hann annars hevur verið.

-eij

## Tvær lisitatiónir hjá Landsverki

Í gjár hevði Landsverk tvær lisitatiónir. Onnur var um rundkoyring í Miðvági, og hin var um kanalisering í Streymnesi.

HZ-gravimaskinur høvdu bíligasta boðið upp á rundkoyringina í Miðvági, og sigur seg kunna gera arbeiðið fyri umleið 1,1 millión, hóast arbeiðið er mett til 1,6 millión krónur.

Hini boðini lógu frá 1,3 milliónir til 1,8 milliónir krónur.

Bíligasta boðið upp á kanaliseringina í Streymnesi, áttu Hans Egil Joensen og synir, sum siga seg kunna gera arbeiðið – sum er mett til 3,2 milliónir krónur – fyri helvtina av metta prísinum, sum altso er 1,6 millión krónur.

Hini boðini liggja millum 1,7 og smáar 4 milliónir krónur.

Hetta upplýsir heimasíðan hjá Landsverki, sum nú fer at taka støðu til innkomnu boðini.

-eij